# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Í gapistokki

Tað man vera breið semja um, at Hans Pauli Strøm hevur verið ein íðin og dugnaligur landsstýrismaður, ið hevur havt ábyrgdina av sera tungum málsøkjum. Hann er nú noyddur at leggja frá sær m.a. sum fylgja av einum alt meira baldrutum politiskum veðurlagi. Tað er eingin, sum kundi so mikið sum funnið uppá at skuldsett Hans Paula fyri at hava misrøkt sítt starv ella við vilja at hava brotið nakra lóggávu ella roynt at fáa persónligar ella politiskar fyrimunir av sínum starvi.

Málið um Hans Paula er eins áhugavert, og tað er syrgiligt. Tað sigur søguna um eina politiska skipan, sum sigur seg vilja eitt og so ger eitt annað. Almanna- og heilsugeirarnir eru dýrir í rakstri, og útreiðslurnar eru støðugt vaksandi, men allir flokkar vilja hava sama vælferðarstøði sum grannalondini. Vit skulu eisini hava atgongd til bestu viðgerðir úti sum heima. Eingin politikari vil ella torir tíbetur at nokta føroyskum sjúklingum bestu viðgerðarmøguleikar og soleiðis eru vit komin inn í eina tilgongd, sum krevur størri upphæddir.

Stóri trupulleikin er ikki meirnýtsla á almanna- og heilsuøkinum. Stóri trupulleikin er, at tað er ikki samanhang millum tað tingflokkar lova, og tað teir gera. Allir flokkar lova meira vælferð og betri tænastur. Men tá tað kemur til skarpskeringar, verður raðfest soleiðis, at almanna- og heilsuøkið, útbúgving, gransking og mentan, tey bleytu økini verða við sviðið soð. Tá so hartil kemur, at vit hava eitt skattahámark, sum avmarkar møguleikarnar fyri øktum inntøkum til landskassan, so eru samstundis møguleikarnir fyri at uppihalda vælferðini avmarkaðir.

So koma andsagnirnar: Gud náði tann almanna- og heilsumálaráðharra, sum dittar sær at lækka tænastu- og veitingarstøðið. So melur absurdi leikurin í ring – vit krevja sjálvsagt eitt høgt almanna- og heilsustøði, men Løgtingið vil ikki gjalda tað, ið hetta kostar. Hinvegin signalerar løgtingið klárt, at støðið skal haldast so ella so, eisini um hetta merkir meirnýtslu og so er landsstýrismaðurin í trunkusmelluni í somu løtu, sum ein andstøðuflokkur vil brúka hetta ímóti honum. Løgtingið hevur, sum ein fyrrverandi løgmaður longu hevur víst á her í blaðnum, de facto viðurkent meirnýtsluna, sum fyri alt tað í stóran mun er lógarbundin. Eingin tingflokkur hevur dirvið at mæla til lógarbroytingar, sum lækka tænastustøðið á almanna- og heilsuøkinum, men tað er heldur eingin, sum hevur dirvi til at útvega tær neyðturviligu inntøkurnar, les hækka skattir og avgjøld fyri ikki at tala um at nema við blokkspurningin, og tí hava vit hesa óndu ringrás. Henda ringrás er sostatt eitt dømi um trótandi politiskt dirvi, um ábyrgdarloysi og um vanvirðing fyri egnum lyftum. Ein stórur meiriluti á løgtingi hevur glaðbeintur lækkað blokkin, men sami meiriluti hevur ikki politiskt dirvi at tryggja, at lækkingin verður dekkað innaftur tvs. dagføra skattalóggávuna og reka ein vinnufremjandi politikk, ið skapar øktar inntøkur. Sostatt er tað ikki bert Hans Pauli, sum situr í gapistokkinum - har situr øll politiska skipanin.

**Sosialurin**

## Másin sigur...nei, nei, nei!



**PÁLL Á REYNATÚGVU**
summargestur í Svínoy

"A very charming ferry", søgdu Niðurlendsku ferðafólkini, hendan dagin vit við Másanum, settu kós móti Svínoy. Fýra ára gamli sonur okkara var av heilt aðrari fatan. Hann helt at tað var einki petti stuttligt at sigla við "Masanum". Sjálvur hugsaði eg, at tað varð nærum ein øld á muni, millum hesar fjalar vit sigldu á, og eitt nú café latté mentanina umborð á Smyrli. Skommin ringdi seg innan í mær, at føroyska samfelagið anno 2009, bjóðar hart royndu fólkunum í Fugloynni og Svínoynni, eina farleið sum hesa.

**Sum á kalvabaki**
Hóast skiparin valdi styttru, og helst frægaru leiðina, hendan dagin, so skolaði sjógvur innanborða, og eingin ferðandi hættaði sær undir dekk. At ein av hydraulikslangunum á krananum, varð farin fyrr um dagin, gjørdi at tað var sum á kalvabaki, hjá teimum sum hættaðu sær uttandura. Manningin, sum varð stak fyrikomandi, eigur rós uppiborið fyri at royna at veita eina tænastu til okkum ferðandi, men týðiligt varð, at máttloysi um hettar neyðars skip, kundi lesast í anlitsbrøgdunum. Vit løgdu at á Eiðinum, og smábørnini vóru syft í land, meðan Másin livdi aftur og fram, eins og taravøksturin á lendingini.

**Skulu hesi setast eftir?**
Standandi á Hálsinum, sum trokar seg niður millum Eysturhøvda og Keldufjall, er frálíkt sýni móti Fugloynni, og í veruleikanum varð tað her, at perspektivini, byrjaðu at mynda seg. Tí, hvussu í víðu verð ber tað til, at føroyska samfelagið, hevur víst seg so eirindaleyst, móti fólkunum sum her búgva, og sum við treysti hava gjørt sítt íkast fyri landið. Hettar framúr vakra umhvørvið bjóðar tær vælkomnum, og fólkini eru eyðmjúk og fyrikomandi.

Hugsaði um restina av infrakervinum í eitt nú Norðoyggjum. Her er undirsjóvartunnil sum bindur til meginøkið. Her eru tunnlar í hópavís sum binda gjøgnum fjøll. Her eru byrgingar, sum binda oyggjar saman og her eru vegir til bygdir, sum Múla og Norðoyri, har sera fá, ella eingi fólk búgva. Og tað er alla æru vert og einastandandi gott. Men hví ólukkan steðgaði framburðurin, tá Fugloyingar og Svínoyingar áttu tørn.

Hesar reglur eru ikki skrivaðar fyri at lasta nakran, men heldur ein undran, ella uppróp til restina av Føroyum um at hjálpa hesum fólkum, í royndini at fáa rímilig samferðsluviðurskifti, á hædd við tey hjá restini av okkum.

**Ritan fyrst...**
Tað er mín inniliga vón og áheitan á vinmannin, Jóhan Dahl, landsstýrismann, at hann sum eina neyðloysn velur Rituna at sigla millum Sund og leysu oyggjarnar fyri norðan. Og tað er ongantíð ov skjótt at taka tað stigið.

**...og undirsjóvartunnil til Svínoyar, heldur enn nýggjar tunnlar Eystur um Fjall.**
Sjálvandi eru verandi tunnlar ótíðarhóskandi, men samanborið við tær treytir Fugloy og Svínoy í dag hava, eru teir tað reina luksus. Ein undirsjóvartunnil til Svínoyar, kostar helst minni enn tunnlarnir Eystur um Fjall, og ger nógv størri gagn uppá sikt. Tí, so miðjumjá Svínoy er um eiðið, er hon, saman við Viðareiði, eitt tað frægasta boðið uppá byggilendi í Norðurpartinum av landi okkara.

Høvuðsuppgávan, er at bjóða øllum okkara borgarum nøkulunda javnbjóðis fortreytir. Og tað ber ikki til at siga at hesi fáu ikki eiga rættin til landið. Fremsta fortreytin fyri framburði er læra og útbúgving, men uttan eitt tíðarhóskandi infrakervi er ikki lív lagað.

Skal kortini vera púra erligur og viðganga, at sjálvur hevði eg raðfest Sandoyartunnilin fremri, men í vali millum nýggjar tunnlar Eystur um Fjall, ella ein undirsjóvartunnil til Svínoyar, hevði eg ivaleysur valt tað seinna.

**"Hells outpost"**
Ein fróðarmaður segði mær henda góðan dagin í Svínoy, at einasti grafitti, sum funnið varð í Føroyum undir krígnum, var í leivdunum eftir eingilskmennirnar, á Draganum. Har segði hann, stóð á einari forvitnisligari hurð "Hells outpost. Let it burn". Lítið mundu hesir menn vita, um hvat í beyðst teimum aðrastaðni undir seinna heimsbardaga, men eitt er vist. Svínoy er ein perla, fyri fólk og fæ, og tey ljósini, sum enn lýsa, eiga ikki at brenna niður. Vit eiga øll ábyrgd av møguligu gongdini, men vit hava góðar møguleikar at taka røttu avgerðirnar nú.

Ferðin til fastlandið aftur, varð við tyrluni, og gekk uppá stás. Spell at týska familjan, við ungarsku mammuni, sum varð komin við Másanum, ikki hevði sama møguleika. Hon var illani á holdum komin, útlúgvað og hjartkipt fyri heimferðini. Kendi tað uttan iva sum "Hells outpost", hóast hon í veruleikanum, helst varð nærri paradísi, enn hon hevði verið áður.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.